ÚTBJÓÐING

## Nýggj høvuðsvatnleiðing til Landssjúkrahúsið

Við hesum verður arbeiðið at leggja nýggja høvuðsvatnleiðing frá J.C. Svabos gøtu fram til bygning 13 (C-bygningur) og bygning 22 (B-bygningur) á Landssjúkrahúsinum, boðið út í almenna lisitatión.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um:
- Upptøku av verandi betongflísum fram við bygningi 13
- Grevstrararbeiði fyri nýggjari vatnleiðing, uml. 70 m
- Leggja nýggja vatnleiðing, uml. 70 m
- Sveisa rustfrí stálrør í tøknirúmið í bygningi 22
- Endurgerð av lendi, so sum tyrving og endurlegging av verandi betongflísum

Lisitatiónin verður á Landsverki, Tinghúsvegi 5, mánadagin 28. juni 2010 kl. 14.00.

Útbjóðingartilfarið verður bert útflýggjað í talgildum formi og verður sent teimum bjóðandi tann 27. mai 2010.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast frá **mánadegi 14. juni 2010** við at venda sær til Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, FO 110 Tórshavn, ella við at senda teldubræv til btl@lv.fo.

SENDISTOVAN

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er ein stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*


STILLADS LEIGA

Absolutt bíligast!



GUTTORM MORTENSEN
www.stilladsleiga.com
TELEFON 25 11 60



Lesið Sosialin


Føroya Studentaskúli og HF-skeið
Hoydalar · FO-188 Hoyvík · Tel 312973

## Avloysari sum hjálparfólk í kantinuni

Til kantinuna verður søkt eftir einum avloysara fyri hjálparfólk í burðarfarloyvi, at byrja 16. august 2010.

Skrivligar umsóknir við møguligum viðmælum skulu sendast til Føroya Studentaskúla og HF skeið, Sanatoriivegur 1, FO-188 Hoyvík, ella sum teldupostur til skrivstovan@hoydalar.fo og skulu vera skúlanum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 21 juni. 12.00.**

Fleiri upplýsingar um starvið eru at finna á www.hoydalar.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar

## SPEKT søkir grannskoðarar

Hevur tú áhuga í saman við okkum at veita føroyska vinnulívinum og øðrum fíggjarliga og vinnuliga ráðgeving, samstundis sum tú mennir tínar førleikar á hesum økjum?

### Starvslýsing

Arbeiðið fevnir um grannskoðan, roknskaparhjálp og eina røð av øðrum tænastum til føroyskar og útlendskar privatar fyritøkur innan flest allar vinnugreinar, eins og til kommunur og almennar stovnar v.fl.

Tú verður partur av einum liði av grannskoðarum og ráðgevum, har tænastan til kundar okkara og fakligi førleikin eru í hásæti. Vit leggja tí dent á, at tú ert fryntlig/ur, hugagóð/ur og fús/ur at leggja orku í hetta avbjóðandi starv. Ávís tíðarskeið er neyðugt at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, serliga fyrru helvt av árinum.

Umsøkjarar skulu í minsta lagi hava students- ella HH-prógv. Tað er ein fyrimunur, men ikki ein treyt, at tú hevur royndir innan grannskoðan og bókhald.

### Útbúgvingin

Umframt at fáa hollar arbeiðsroyndir gjøgnum dagliga arbeiðið fært tú eisini eina ástøðiliga útbúgving, við tað at tú fylgir HD-undirvísingini á Føroya Handilsskúla. Tú fært eisini innanhýsis undirvísing hjá okkum.

### Framtíðarmøguleikar

Aftaná lokið HD-prógv hevur tú møguleika at halda fram at útbúgva teg við at taka cand.merc.aud. útbúgvingina, sum er neyðug fyri at gerast løggildur grannskoðari. Á henda hátt kanst tú hava eitt spennandi starv, samstundis sum tú fært eina holla ástøðiliga útbúgving.

Møguleikarnir at menna sínar førleikar hjá SPEKT eru tí sera góðir.

### Umsóknin

Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til okkara skjótast til ber ella í seinasta lagi 21. juni 2010. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Mirjam Haraldsen á tlf. 34 34 70 / 23 34 70 ella við at skriva teldupost til: mharaldsen@spekt.fo

Fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

*SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f grannskoða, veita roknskaparhjálp og ráðgeva í skatta- og vinnuviðurskiftum. Vit arbeiða millum annað fyri einstaklingar, handilsfyritøkur, ídnaðarfyritøkur, kolvetnisfeløg, reiðaravirki, peningastovnar, fíggingarstovnar, kommunur og almennar stovnar.*

Staravegur 17
Postsmoga 3258
110 Tórshavn

Telefon 34 34 34
Telefaks 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo


Altjóða Skrivstovan
International Office

## TOEFL*-roynd

fríggjadagin 23. juli, 2010

Møguleiki er aftur at taka sonevndu TOEFL iBT-royndina í Føroyum.

TOEFL-royndin er ofta upptøkukrav á hægri lærustovni í ensktmæltum londum.

Royndin verður fríggjadagin 23. juli, kl. 10.00 á Fróðskaparsetri Føroya, Nóatúni 3.

Tilmeldingarfreistin hjá TOEFL er í seinasta lagi 8 dagar undan royndini, men mælt verður til at melda seg til í góðari tíð vegna avmarkað pláss hjá okkum.

Tilmelding fer fram on-line á: www.ets.org/toefl

Kostnaður er $160

*Test of English as a Foreign Language



Stock Photo: sxc.hu/profile/chris27

Altjóða Skrivstovan
tlf. 322065 - ask@ask.fo - www.ask.fo

Fróðskaparsetur Føroya
tlf. 352500 - setur@setur.fo - www.setur.fo



4ever www.4ever.fo



Stórt úrval av heingikoyggjum og heingistólum í nógvum ymsum litum

**prísir úr 499 kr.**

**Nógv nýggj vøra heimkomin**



Nógv havaprýði, so sum benkur, borð o.a.

Víkarvegur 33 · 340 Kvívík
Tlf. 21 89 80 / 21 16 77 · 4ever@email.fo